## Familjuráðgevarar fingu prógv

Í gjár fingu 23 fólk prógv sum familjuráðgevarar og familjuterapeutar frá Kemplet Institut og Scandinavia.

Hetta er ein 3 ára eftirútbúgving, sum er skipað við 6 vikumodulum um árið, tilsamans 900 tímar.

Útbúgingin er farin fram á Tekniska Skúla í Klaksvík, har undirvísarar frá Kempler stovninum í Danmark hava givið frálæru.

Undirvísarnar hava verið Mogens A.Lund barnasálarfrøðingur/faml.terapeutur, sum hevur skrivað bókina *Konsulent, arbejde og supervision*, Jesper Juul, familjuterapeutur, sum er rithøvdur til bókina *Det kompetente barn*, Birgit Juhl, sosialrágevi/familjuterapeutur, Petur Mortensen, sálarfrøðingur/familjuterapeutur, Marianna Reenberg, sosialráðgevi/familjuterapeutur, Charlotte Hertl, sálarlækni/familjuterapeutur og Walter Kempler, sum stovnurin er kallaður upp eftir.

Vanligt hevur verið, at føroysku nemingarnir eru farnir til Danmarkar at taka prógvið, men nú hevur Kempler stovnurin ístaðin sent lærarar til Føroya at undirvísa, og teir hava fingið innivist á Tekniska skúla í Klaksvík.

## FUR skipar fyri ungdómsfundi

Føroya Ungdómsráð hevur boðið umboðum fyri barna- og ungdómsfelagsskapum til fundar í Norðurlandahúsinum í dag klokkan 14 í sambandi við, at Nordisk Ungdomskomité hevur fund í Havn frá 4. til 7. mai.

Joachim Clausen, sum er formaður í Nordisk Ungdomskomité, fer at greiða frá arbeiðinum hjá nevndini, og høvi verður hjá fundarfólki at spyrja.

Nordisk Ungdomskomité er nevnd undir Norðurlendska Ráðharraráðnum, sum m. a. ráðgevur í barna- og ungdómsmálum, og letur norðurlendskum barna- og ungdómssamstarvi stuðul. Nevndin er mannað við limum úr øllum Norðurlondum. Umboð fyri Føroyar er Kári Olsen, sum er aðalskrivari hjá FUR.

# Genturnar sum skelkaðu New York

*Í komandi viku fara vit at hava stóra myndafrásøgn frá ferðini hjá føroysku gentunum, sum við framúrskarandi úrsliti luttóku í stórari modellkapping í New York*



*Ein teimum mongu greinunum, sum føroysku genturnar stóðu seg sera væl í var hin sonevnda runaway*

***Mynd: 3-arin***

Sum kunnugt vóru ellivu føroyskar gentur herfyri við í stórari modellkapping í New York.

Hóast hetta var fyrsta ferðin, at føroyingar luttóku í kapping, og hóast føroyska/íslendska ferðalagið mundi teljast millum tey minstu á ferðini, so smæddust tær ikki burtur millum hinar 2.000 luttakararnar.

Sum nevnt í blaðnum fyrr í vikuni, so vunnu føroysku genturnar hópin av steypum og heiðursmerkjum á ferðini, og er hetta í sjálvum sær eitt sera flott avrik.

Ikki minni merkisvert var allir teir fyrispurningar, sum føroysku genturnar síðani hetta hava fingið frá fleiri av stóru altjóða mótahúsunum, sum eisini vóru umboðaði í New York.

**Hvussu við framtíðini**

Í komandi viku fara vit í blaðnum at hava myndafrásøgn frá ferðini hjá føroysku gentunum.

Hava gentunar longu nú fingið eina hylling á, hvussu tilveran í mótaheiminum kann vera, og hevur onkur teirra longu nú gjørt upp við seg sjálva, hvørt tær kundu hugsað sær einu tilveru í hesum serliga umhvørvi?

Eitt er í øllum førum vist. Tær hava allar fingið eina risastóra uppliving, og hesum verður greitt meira frá komandi tíðina.

Eisini fara vit í YNGD at hava samrøður við genturnar, og verður hetta tilfar at lesa komandi vikurnar.

# Virusálop gjørt stóran skaða

*Allur internetheimurin varð í gjár álopin av einum heviligum telduvirusi, sum hevur gjørt stóran skaða*

Eyðun Klakstein

Love Bug telduvirusið, sum hevur gjørt um seg á internetinum seinastu tveir dagarnar, hevur oyðilagt fyri fleiri hundrað milliónir krónur, meta serfrøðingar. Og nú jagstra Interpol og FBI upphavsmannin til virusið.

Føroyskar fyritøkur og einstaklingar hava fingið virusið sendandi, og summi hava eisini latið fylgisskjalið upp, so at virusið er komið í telduna hjá teimum. Virusin ger seg inn á Explorer-forritið, og tað skrivar út yvir ljóð- og myndafílar. Harafturat sendir tað seg sjálvt víðari til aðrar internetbrúkarar.

Nógv eru støðini, har teldubrævið við heitinum „I love you“ hevur sent Love Bug virusið í telduskipanina. Parlamentini í okkara grannalondum eru rakt. Pentagon, CIA, bankar, telefuyritøkur og nógv onnur støð hava kent sviðan av virusinum, og í gjárkvøldið skrivaði Jyllands-Posturin at virusið hevði oyðilagt 20.000 myndir í teirra savni.

Fyritøkan Trend Micro, sum fæst við teldutrygd, metti í gjár, at 1,27 milliónir teldur vóru raktar av virusinum higartil.

**Broytti navn**

Serfrøðingar mettu í gjár, at virusið fór at broyta navn til „Joke“ í gjár, og tí mugu fólk eisini verða varðin, um tey fáa teldubræv við hesum heitinum. Vandin er ikki av enn, og næstu dagarnar kann virusið fara at gera um seg undir øðrum nøvnum.

Umráðandi er, at fólk ikki lata fylgisskjøl upp, men beina teldubrøvini burtur. So leingi sum fylgisskjalið ikki verður latið upp, verður teldan ikki smittað.

Love Bug virusið verður mett at verða vandamiklari enn tað tiltikna Melissa virusið, sum gjørdi um seg í fjør.

Interpol og FBI jagstra nú upphavsmannin til virusið, og í løtuni fara kanningar fram í Manilla, har ein internetútbjóðari heldur, at virusið er sent út frá tveimum av teirra teldupost adressum.

Tað ber til at verja seg móti virusinum við at nýta virusverju, og nú ber eisini til at fáa eina skipan, sum verjir telduna í móti Love Bug virusinum. Hendan verjan kann takast niður av internetinum.

# Aftur at kappast um at syngja



*Arnfríð Lützen er ein av vinnarunum seinastu árini*

verið afturvendandi í næstan 20 ár, og í ár verður aftur skipað fyri hesi kapping.

Fyrireikararnir ætla, at Nú verður aftur skipað fyri kappingini Ársins songrødd.

Hendan kappingin hevur fyrsta innleiðandi umfarið skal vera í Vágum 13. mai. Kappingin endar við eini finalu í Havn eina ferð í juni mánaði.

Vinnarin av kappingin fær eina trivaliga peningaupphædd sum vinning, umframt at royndir siga, at vinnarin ofta sleppur at royna seg bæði á palli og á útgávum.

Tveir teir seinastu vinnararnir av Songrødd kappingini teljast í dag millum fremstu songkvinnurnar í landinum. Tær eru Eivør Pálsdóttir og Arnfríð Lützen, sum hava verið nógv frammi seinastu tvey árini. Í ár verður eisini pláss fyri gentu- ella mannfólkabólkum og tað ger, at Songrødd kappingin ikki verður ein útilokandi solistkapping.

Í Yngd komandi mikudag verður meira at frætta um Songrødd kappingina.

**ek**

## Fundur um lesiførleika

Í dag klokkan 15 skipar móðurmálslærarafelagið fyri fundi í Argja Skúla um lesing og lesiførleika. Ætlanin var, at fundurin skuldi haldast 1. apríl, men vegna læraraverkfallið varð fundurin útsettur.



# Donsk bløð: Harða linjan heldur fram

*Donsku bløðini eru samd um, at landsstýrið ikki fekk bloytt donsku stjórnina undir samráðingarfundinum hósdagin, hóast samráðingarandin nú var betur*

John Johannessen

Eftir annað umfar av samráðingunum um ríkisrættarligu støðu Føroya meta donsk bløð, at stóra trýstið í samráðingunum enn liggur á landsstýrinum, sum í veruleikanum ikki fekk nakað ítøkiligt úrslit burtur úr fundinum týsdagin.

Høvuðsynski føroyinga um eina skiftistíð á 15 ár varð skúgvað til viks. Men kortini var tað ein fegin løgmaður, ið vísti seg á tíðindafundinum í speglsalinum eftir samráðingarnar.

Hetta halda donsku bløðini hevur sína orsøk. Millum annað skrivar Berlingske Tidende í einari tíðindaanalysu mikudagin, at tað væl kann hugsast, at løgmaður sýntist so fegin fyri at vinna meiriluta fyri fullveldisætlanini í Føroyum millum teirra, ið ivast í ætlanum landsstýrisins.

Berlingske Tidende sigur, at landsstýrið møguliga hevði stúrt fyri, at annar samráðingarfundurin fór at enda í ruðulleika, eins og tann fyrri. Eisini heldur blaðið, at optimistisku signalini framman fyri teimum mongu upptøkutólunum í forsætismálaráðnum møguliga vóru politiskt neyðug fyri landsstýrið, um tað skal vinna meiriluta í Føroyum fyri síni merkissøk.

**Trupult fyri landsstýrið**

Landsstýrið ynskir at fáa ein sáttmála um frælsan felagsskap millum Danmark og Føroyar meðan danska stjórnin hellir tann vegin, at fullveldi merkir ein verulig uppgerð millum londini bæði. Somuleiðis ynskir landsstýrið, at danir skulu umsita ymsik málsøki fyri føroyingar. Hetta er stjórnin sinnað at gera, men føroyingar skulu gjalda fyri tað.

Tískil metir Berlingske Tidende, at løgmaður hevur ein forkláringstrupulleika. Hann skal sannføra tey, sum ivast í fullveldisætlanini, hvussu ein avgjørd frástøða frá donsku stjórnini til føroyska høvuðsynski um góða búskaparliga skiftistíð kann styrkja trúnna upp á eitt burðardygt samfelag eftir loysingina.

Eisini vísir blaðið á, at danska stjórnin hevur víst aftur krøvunum um, at føroyingar og danir skulu varðveita síni felags rættindi hvør hjá øðrum. Føroyingar skulu ikki hava ørðvísi rættindi enn sviar ella norðmenn.

**Flyta til Danmarkar**

Ekstrablaðið er enn harðrendari móti landsstýrinum. Í týsdagsútgávuni stendur við stórari yvirskrift »Selvstændig - men på dansk socialhjælp«. Í greinini stendur, at føroyingar fegnir ynskja at gerast sjálvstøðugur, men at teir samstundis ynskja at varðveita drotningina og donsku almannahjálpina.

Blaðið sipar við hesum til, at um Føroyar fáa fullveli og varðveita somu rættindi í Danmark, sum teir nú hava, er vandi fyri, at føroyingar fara at flyta til Danmarkar í hópatali, lækkar livistøðið.

**Popoulistisk ætlan**

Oddgreinin í hósdagsútgávuni av Politikken viðgerð eisini fullveldisætlanina. Hon skírir millum annað fullveldisætlanina at vera populistiska, tá landsstýrið heldur fast um, at fullveldissamráðingarnar skulu vera lidnar áðrenn september mánað.

Eisini vísir oddagreinin á, at ætlan landsstýrisins als ikki leggur upp til at fáa avklárað viðurskiftini millum Føroyar og Danmark, eins og landsstýrið førir fram. Tvørturímóti heldur blaðið, at hugskotið um fult politiskt sjálvræði, sum skal umsitast av donskum embætismonnum, dómarum og øðrum, júst leggur upp til trupulleikar.

Orsøkina til hetta heldur blaðið vera, at sjálvstýrisynski føroyinga ríða á einari aldu eftir bankamálið.



*Donsk bløð halda ikki, at landsstýrið fekk nakað serligt burtur úr øðrum umfari av ríkisrættarligu samráðingunum í Kyepmannahavn týsdagin*



# Uttanlandsnevndin kunnað

Fyrrapartin í gjár hevði landsstýrið fund við uttanlandsnevndina, har tað kunnaði hana um ríkisrættarligu samráðingarnar í danska forsætismálaráðnum seinasta týsdag.

Sosialurin frætti frá limum í uttanlandsnevndini áðrenn døgurða í gjár, at teir ikki hava fingið sørt meira at vita á kunnandi fundinum, enn tað, komið er fram í fjølmiðlunum undir og eftir samráðingarnar.

Fundurin fyribils avbrotin á middegi í gjár, orsakað av, at tingfundur skuldi vera seinnapartin. Ætlanin var tó at taka fundin upp aftur, tá tingfundurin var liðugur.

DANMARK
SKOTLAND
ÍSLAND

Aftur og fram, tá 2 ferðast saman, úr kr.

1.480,-

Ferðaavgjald kemur afturat prísinum.

SANSIR TEL 355 355

Atlantic Airways

Vága Floghavn, FO-380 Sørvágur, Tel 333 900, Fax 333 990, e-mail: booking@atlanticairways.fo